

## Kreppan rakar Bornholm meint

Av teimum einstøku landspørtunum í Danmark er eingin so meint raktur av búskaparkreppuni sum Bornholm. Formaðurin í ídnaðarfelagnum á oynni, Michael Almeberg, sigur við kringvarpið DR, at ídnaðarvirkir á oynni noyðast at taka neyðug stig nú fyri at skáka sær ígjøgnum kreppuna. Eitt nú mugu virkini laga framleiðsluna eftir marknaðinum , samstundis sum tey mugu leita eftir nýggjum vørum og nýggjum marknaðum. Samstundis er tað umráðandi, at kommunur og aðrir myndugleikar ikki leggja nýggj krøv á vinnuna, sigur Michael Almeberg.

# Vestmanna kommuna fer ikki at siga fólki úr starvi

**- Vit eru ikki ringast fyri av føroysku kommununum, og vit hava ongar ætlanir um at siga nøkrum úr starvi, hvørki inni ella úti, sigur borgarstjórin, sum annars fegnast um, at skattainntøkurnar hjá kommununi hava hildið stand higartil í ár**

**VESTMANNA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*





*- Støðan hjá okkum er góð í mun til støðuna, sum nógvar aðrar kommunur eru í. Tað er tó rætt, at útreiðslusíðan í dag samsvarar ikki heilt við inntøkusíðuna, nú vit ikki kunnu vænta okkum størri skattainntøkur í ár. Tí fara vit at gera eina eykafíggjarætlan í summar, sigur Karl A. Olsen, borgarstjóri*

Skattainntøkurnar hjá Vestmanna kommunu eru at kalla óbroyttar fyrstu fýra mánaðirnar í ár í mun til somu mánaðir í fjør.

Borgarstjórin í Vestmanna, Karl A. Olsen, sigur, at sambært Taks eru nettoinntøkurnar av skatti í hesum tíðarskeiði minkaðar við 0,56%, sum má sigast at vera ein evarska lítil minking.

- Vit kunnu siga, at minkaðu inntøkurnar stava frá broytingunum í FAS-skipanini, har kommunuskattur ikki longur verður goldin av FAS-inntøkum. Vit rindaðu umleið 450.000 krónur til FAS-skipanina í fjør, meðan inntøkurnar vóru umleið 600.000 krónur. Nú missa vit 600.000 krónur um árið og sleppa samstundis undan at rinda tær 450.000 krónurnar eftir nýggju skipanini. Hetta er soleiðis ein nettominking í inntøkum upp á einar 150.000 krónur.

Karl vísir á, at undantikið inntøkumissin orsakað av broytingunum í FAS-skipanini eru skattainntøkurnar hjá kommununi heldur hægri higartil í ár í mun til somu tíð í fjør.

### Hægri meting

Borgarstjórin sigur, at tá kommunustýrið legði fíggjarætlanina fyri árið í ár, væntaðu tey, at inntøkurnar fóru at verða heldur størri í ár, enn tær higartil hava víst seg at vera.

- Vit bygdu inntøkusíðuna á fíggjarætlanini á 10 teir fyrstu mánaðirnar í fjør, men sum árið leið, vísti tað seg, at inntøkurnar fyri desember gjørdust tær lakastu í árinum. Nú bendir so alt á, at skattainntøkurnar verða á leið tær somu í ár sum í fjør.

Spurdur um hægra inntøkumetingin í verandi fíggjarætlan merkir, at kommunan so eisini setti heldur størri tøl á útreiðslusíðuna, enn tey høvdu gjørt, um tey kendu inntøkugrundarlagið betri, sigur Karl:

- Í fyrsta lagi vil eg siga, at støðan hjá okkum er góð í mun til støðuna, sum nógvar aðrar kommunur eru í. Men rætt er, at útreiðslusíðan í dag samsvarar ikki heilt við inntøkusíðuna, nú vit ikki kunnu vænta okkum størri skattainntøkur í ár.

### At endurskoða

Borgarstjórin vísir á, at kommunustýrið í næstum fer at endurmeta fíggjarætlanina.

- Vit hava higartil í ár roynt at tálmað útreiðslusíðuna, og nú í summar fara vit at gera eina eykafíggjarætlan, har vit fara at tálma onkrar útreiðslur.

Karl vísir á, at bygdarráðið fer at taka støðu til at minka um onkrar rakstrarútreiðslur – ella at draga onkrar íløgur, sum eru samtyktar, yvir longri tíð, soleiðis at kostnaðurin býtir seg yvir eitt longri tíðarbil.

### Ongar uppsagnir

- Vit fara ongan at siga úr starvi. Umsitingin av kommununi er lítil sum er, og umframt borgarstjóran eru bert trý fólk í sjálvari umsitingini. Vit hava heldur ikki nógv fólk úti á vegunum og í starvi hjá kommununi annars. Karl sigur, at tann stóri posturin hjá Vestmanna kommunu og øðrum kommunum av somu stødd er dagstovnaøkið.

- Men hetta eru ikki fólk, tú koyrir til hús. Í stuttum kann eg siga, at vit ongar ætlanir hava um at siga nakran úr starvi, hvørki inni ella úti, sum borgarstjórin í Vestmanna tekur til.

Karl A. Olsen situr nú á øðrum skeiði við stýrisvølin í Vestmanna kommunu.

# At skeinkja snýr seg um vinnu – ikki etikk

**- Tá Café Bryggjan og Fjørukrógvin søktu um at fáa longt skeinkiloyvi, mælti eitt einmælt bygdarráð til leingjan, sigur borgarstjórin í Vestmanna**

**VESTMANNA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Karl A. Olsen, borgarstjóri, heldur einki skeivt vera í, at bæði Café Bryggjan og Fjørukrógvin í Vestmanna hava hvør sítt fulla skeinkiloyvi.

Hann heldur, at tá søkjast kann um loyvi til skeinking í Føroyum, og Vestmanna samstundis hevur ríkt ferðavinnulív, kundi hann ikki hugsað sær at atkvøtt ímóti, at skeinking verður verandi sum ein partur av virkseminum.

### Virksemi – ikki etikkur

- Eg síggi eitt skeinkiloyvi í slíkum føri meira sum partur av einum vinnuligum virksemi enn sum ein spurning um etikk, sigur Karl.

Tá ið Vestmanna bygdarráð seinast fekk umsókn til ummælis um leingjan av verandi loyvum, tók eitt einmælt bygdarráð undir við hesum.

Hetta bendir á, at bygdarráðini kring landið síggja ymiskt uppá slíkt virksemi, og ymiskt kann væl eisini vera, hvønn týdning eitt slíkt loyvi verður mett at hava fyri eitt nú ferðavinnuna.

- Eg síggi slík skeinkiloyvi sum partur av ferðavinnu- og matstovuvirksemi, endurtekur Karl A. Olsen, borgarstjóri.